gult cyan magenta svart



**FELAGSLÍV. Nøkur feløg í Vági hava tikið seg saman um at seta í stand Stóra Pakkhús, ið er ein av bygningunum hjá handilsvirkinum á Gørðunum. Húsini stóðu nærum at detta, tá timburmenn við ársbyrjan fóru í gongd við umvælingina og um eini 3 til 4 mánaðir fara hurðarnar upp í húsinum, sum verður mentanarhús. Dentur verður lagdur á at fáa tiltøk í húsið og at skapa lív og virksemi og fyrireikararnir hava vónir um samstarv við mentadeplarnar í Føroyum**

# Stóra Pakkhús – eitt mentanarhús



*Á Gørðunum var lívligt fyrr. Nú er so smátt lív við at koma í aftur. Garðabrúgv varð sett í stand fyri stuttari tíð síðani og nú er Stóra Pakkhús við at verða umvælt og fáa nýtt innihald sum mentanarhús*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

MENTAN

*Dagfinn Olsen*

Stóra Pakkhús verður tað nevnt og hevur verið tað leingi. Húsini eru bygd í 1901 og vóru partur av Handilsvirkinum á Gørðunum. Sostatt vóru húsini partur av einum av størstu ídnaðarmiðdeplunum í Føroyum. Men alt hevur sína tíð og síðstu mongu árini hava húsini ikki júst verið ein vøkur sjón.

Men nú eru broytingar við at henda. Seks frítíðarfeløg í Vági hava tikið seg saman um at seta húsini í stand. Síðani fara tey at húsast har, umframt at húsini fara at virka sum mentanarhús.

## Alskyns virksemi

Vágs Fornminnasavn, Felagið Johanna TG 326, Vágs Kappróðrarfelag, Garðabrúgv, Grindabátafelagið og Nýggjársnevndin stovnaðu tann 23. desember í 1999 felagið Stóra Pakkhús. Síðani hevur verið arbeitt, men nógv virksemi er í samfelagnum, so ikki eydnaðist at fáa timburmenn til arbeiðið, fyrr við ársbyrjan í ár.

Fyrsta byggistig er í gongd og fevnir hetta um at skifta tak, klædning og vindeygu. Mortan Petersen, timburmaður, stendur fyri arbeiðinum og sigur hann, at húsini vóru ikki í góðum standi, tá teir fóru undir arbeiðið, men hann er vísur í, at endaliga úrslitið verða eini stásilig hús. Umframt at skifta tak, klædning og vindeygu, eru partar av stórviðinum eisini skiftir, tó mest undir vindeygum og slíkt.

Búi Dahl er formaður í felagnum Stóra Pakkhús og greiðir hann frá, at 4 hæddir eru í húsinum.

– Ovast verður goymsla til bøkur, skjøl og annað. Næstovast er tað, ið nevndist seglloftið. Har er ætlan at hava fundarhøli og sjósavn. Her kann t.d. hugsast, at sjóparturin av Fornminnasavninum kann halda til, sigur Búi.

– Næsta hæddin er salur og móttøkuhøli. Hølini kunnu nýtast til mangt og hvat og hugsað verður um tiltøk av mentanarligum slag, greiðir Búi frá, meðan hann bendir hugan á, at mentan er so mangt og at rúm er fyri sera mongum, t.d. fyrilestrum, bingo og samkomum av øðrum slag.

Umframt salin, verða eisini wc, køkur og telefon í hesi hæddini.

– Í niðastu hæddini er pláss fyri tveimum bátum. Ætlanin er, at kappróðrarfelagið skal nýta hesi hølini – í hvussu er í summarhálvuni – og venjing skal so ganga útfrá hesum hølunum. Í niðastu hæddini eru eisini tvey skiftirúm, brúsa og vask og fýrrúm og vaskirúm. Eisini er ein minni goymsla, ið kann nýtast til ymiskt, greiðir Búi Dahl frá.

## Vóna mentanarsamstarv

Búi Dahl sigur, at umvælingin av húsunum hevur verið í samstarvi við Føroya Fornminnissavn og arkitektur frá savninum hevur verið við alla tíðina.

Samstarvið hevur verið sera gott, sigur Búi. Umvælingin er soleiðis háttað, at nógv av húsinum verður varðveitt, t.d. veggir og loft og millum forkunnugu lutirnar er eisini gomul elskipan frá tíðini, tá Vágur fekk ravmagn, sum fyrsta bygd í landinum. Men tað, ið verður gjørt av nýggjum, so sum wc og annað, verður gjørt heilt av nýggjum.

Um einar 3 til 4 mánaðar eru húsini væntandi liðug og hurðarnar kunnu latast upp. Fyrireikararnir vóna samstarv norðureftir á mentaøkinum. Búi Dahl sigur, at hann vónar, at til ber at fáa í lag samstarv við Norðurlandahúsið og onnur, ið skipa fyri og ganga á odda á mentaøkinum. Hann sigur, at Norðurlandahúsið er fyri allar Føroyar, og at húsið fegið sendir tiltøk kring landið, men at nakað eisini skal vera at koma til og tað vónar hann, at Stóra Pakkhús fer at verða við til at bøta um.

Búi Dahl leggur dent á, at hóast sjósavn og annað er í húsinum, so er ikki ætlanin, at Stóra Pakkhús skal verða »museum«.



*Timburmeistarin skoðar tekningar av nýggja mentanarhúsinum í Vági. Stóra Pakkhúsi er í baksýni*

*Mynd: Dagfinn Olsen*







*Á Gørðunum. Gomul mynd, ið vísir økið, har Stóra Pakkhús er*
*(Úr bókini »Úr Vágs Søgu«)*

*Nógv virksemi var á Gørðunum, ið var millum fremstu handilsvirki í landinum. Tíðir broytast og seinnu árini hevur tíðarinnar tonn sett dám á. Tá farið varð undir at seta í stand Stóra Pakkhús, var tað ikki júst ein prýðilig sjón*

*Mynd: Dennis Holm*

– Tað skal vera lív og virksemi, sigur Búi, sum vónar og væntar, at við feløgunum og nýggju hølunum, eru karmar skaptir, sum virksemi stendst av.

– Eitt er at seta húsini í stand, men tað er líka stórt, ella størri arbeiði at fylla karmarnar út og skipa fyri virksemi í húsinum, metir Búi.

## Marina

Feløgini standa fyri arbeiðinum og hava tveir limir hvør í nevndini fyri húsið, meðan Vágs Býráð hevur ein lim.

Sum skilst, hevur Býráðið verið hollur stuðul og hevur játtað stuðul ávíst áramál.

Dreymurin hjá stigtakarunum er, at einaferð í framtíðini kann eitt umsjónarfólk setast at taka sær av dagliga rakstrinum av húsinum.

Annað, ið liggur úti í sjónarringinum hjá hugsjónarmonnunum aftanvert Stóra Pakkhús er, at húsini eisini kunnu nýtast, tá stuttleikabátar og ferðafólk annars koma til bygdar. Aðrastaðni í landinum er slíkt virksemi ikki ókent.

– Atgongd er til WC og vask og telefon og internet, men hesar ætlanir er alt nakað, ið kann koma, um vit hugsa longur fram, sigur Búi.

## Brátt liðugt

Sum er, hava feløgini, ið standa saman um Pakkhúsið, nóg mikið at takast við. Um einar 14 dagar rokna timburmenninir við at vera lidnir við sín part.

So skulu karmarnir fáa síðstu hondina og síðani skulu teir fyllast út. Men Búi Dahl, formaður, roknar við, at um 3 til 4 mánaðir, tað vil siga í juni ella juli, verða hurðarnar latnar upp á nýggja mentanarhúsinum í Vági og ætlar hann tá, at ein skrá er gjørd yvir tey tiltøk, ið verða í húsinum fyrstu tíðina.



*Um einar tríggjar, fýra mánaðir lata tey dyrnar upp í Stóra Pakkhúsi í Vági, sum framyvir verður mentunarhús*

*Mynd: Dagfinn Olsen*


## Næmingur í Føroya Sparikassa



# Ert tú tann rætti ... ?

Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persónligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár. Byrjað verður 3. september 2001.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2001 kl. 16.

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin Yviri við Strond 2 100 Tórshavn Tel 348 000 Fax 348 453
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikassin.fo www.sparikassin.fo